LÆRLINGAR
til Sjónvarp Føroya

Sjónvarp Føroya søkir tveir lærlingar til útbúgvingina sum miðlatøknimekanikari at byrja 1. mars. Læran umfatar alt tekniskt arbeiði í sjónvarpinum, m.a. upptøkur, redigering og viðlíkahald av útgerð.

Útbúgvingin tekur 4½ ár.
Av hesum eru 55 vikur skúlagongd í Danmark.

Førleikakrøv:
"Grundforløbet teknologi og kommunikation inden for den kreative mediefamilie" á góðkendum skúla ella HH-/HF-/students-prógv.

Royndir við og áhugi fyri sjónvarpsmiðlinum er ein fyrimunur.

Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu sendast til
Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2,
Postboks 21, 110 Tórshavn
og vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. februar kl. 13.00.
Umsøkjarar mugu vera tøkir til praktiska roynd leygardagin 15. februar.

SISSIRO 35980

svf

Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn

Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan 1. mars 2003.

Uppgávan:
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum og umsýn av akførum, sum ikki verða góðkend við fyrsta sýn. Starvsøkið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verað røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini

Førleikakrøv:
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum innan økið. Dentur verður lagdur á góð samstarsvevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.
Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

Setanartreytir:
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið og tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. februar 2003.

Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálarðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.

Pedagogur/-hjálparfólk
til Dagrøktina í Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir Pedagogi/hjálparfólki til Kommunalu Dagrøktina í Runavíkar Kommunu at arbeiða 30 tímar um vikuna.

Í Dagrøktarskipanini eru 90 børn og 21 dagrøktarmammur.

Vit ynskja at tú ert kreativ, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum. Arbeiðið verður í størstan mun skipað út frá spælistovuni.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal verða Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 07.02.2003.

Dagrøktarskipanin í Runavíkar kommunu
Heiðavegur · 600 Saltangará

Hervið verður matstovan í bygdahúsinum á Strondum lýst til leigu frá 1. mars 2003.

Umsóknir skulu verða í Sjóvar kommunu í hendi í seinasta lagi 15. feb. 2003.

Sjóvar kommuna
490 Strendur

Leiðari til Dagstovn í Sandavági

Sandavágs kommuna søkir við hesum eftir leiðara til nýggja Dagstovnin í Sandavági, sum eftir ætlan letur upp í apríl/mai mánað 2003.

Stovnurin er í 4 eindum, settur saman av vøggu- og barnagarðsstovum.

Vit bjóða leiðaranum
– eitt áhugavert starv í einum umhvørvi tætt við náttúru, har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin.
– at seta starvsfólk og annars vera við í øllum tí, sum skal til fyri, at stovnurin skal virka eftir ætlan.

Møguleiki er fyri ráðgeving og eftirútbúgving.

Vit ynskja
at umsøkjarin
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir innan økið
- kann arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og geva greið boð
- er tilreiðar at fara virkin inn í, og sum ein partur av starvsfólkabólkinum
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemi í einum barnagarði
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag, merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- er opin, positivur og duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika

Lønarviðurskifti
Starvið verður sett eftir avtalu og áðrenn stovnurin letur upp, sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita
Um starvið við at venda sær til Rósu Samuelsen, borgarstjóra, tlf. 332470 el. 214070.

Umsóknir
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sandavágs kommunu, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi 10. februar 2003. Viðmerk á umsóknina »Leiðari«.

Kommunan skilar sær rætt til, um ikki nóg nógvar umsóknir eru, at lýsa av nýggjum.

SANDAVÁGS KOMMUNA

RØRARBEIÐI
Skjót og góð tænasta
innan hita, vatn, sanitet og ventilatión
Ring og avtala tíð
Tilboð verða eisini givin

rør-tænastan
Vatn-Hitt-Sanitet-Ventilatión
Evfinn Hansen
Borkagøta 5
Fo-190 Tórshavn
Føroe Islands
tlf./fax: +298 31 91 22
farmtlf.: +298 21 91 22
e-mail: evfinnh@post.olivant.fo

Lesið Sosialin - tað loysir seg

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

MITSUBISHI COLT
árg. 86, 165.000 km, sýnaður sept. 02. Til sølu fyri 4500,- kr. vegna flyting.
Tlf. 267580

FORD SIERRA 1.8
árg. 85, góður til eykalutir, er bíliga til sølu. Ring og hoyr nærri
á tlf. 228404 ella 371576

TIL SØLU
Volvo 240 2.3 GL, árg. '88. Bilurin er silvurgráur og sera vælhildin. Sýnaður í 2002, ongan kross. ring
Tlf. 224560

NISSAN SUNNY B11
árgang 86 til sølu sum eykalutir fyri 2000 kr.
Tlf. 422364

ÓVIRKIN SAAB 900
Kann brúkast til eykalutir til sølu.
Tlf. 260334

PÍKADEKK TIL LASTBIL
6 stk. góð Good Year píkadekk, stødd 285/70R 19,5 til sølu.
Tlf. 213577

TOYOTA CAMRY 2.0 GLI
Full Time 4WD, árg. 12/88. Nýsýnaður, nýggj dekk, aircondition, elrútar, powerstýring, sentrallás bíliga til sølu.
Tlf. 213577

SKUTARI TIL SØLU
Piaggio NRG, árg. 2000 við kápuskaða. Prísuppskot: 9.000 kr.
Tlf. 421535

PÍKADEKK
4 stk. lítið brúkt píkadekk á felgum, stødd 155/70-13 passa til Ford Fiesta, selist bíliga.
Tlf. 259305 ella 319950

MAZDA PREMACY
árg. aug. 2002. El-rútar og sperru á forhjólum. Sera bíliga til sølu.
Tlf. 223245 ella 423494

METALGRØNUR KIA SPORTAGE 4 WD JEEP 2.0
Turbo Diesel, árg. '98 til sølu um hóskandi boð fæst. Er vælhildin, nýsýnaður og hevur koyrt 63.000 km. Áhugaði ring
Tlf. 445061 eftir kl. 19.00

TIL SØLU
Toyota Corolla 1600, árg. nov. '84. Koyrir væl, til sølu.
Tlf. 328050

TOYOTA DYNA 150
lastbilur, árg. 1990, sýnaður des. 2002.
Tlf. 333488 eftir kl. 17

DAIHATSU CHARADE 1,0
Ein Daihatsu Charade G11 er til sølu fyri 10.000 kr. Hann er frá 09 mánað í 1985. Hann hevur koyrt 152.800 og er sýnaður miðskeiðis í 2002. Hann koyrir væl. Ring
Tlf. 320540 aftaná kl. 18 ella 520540 í arb.

TOYOTA HILUX
4 wd, árg. 86 til sølu.
Tlf. 371152 ella 215296

CHEVROLET MALIBU
árg. 80 til sølu.
Tlf. 448547 e. kl. 17

TIL SØLU
4 felgur til Ford Escort, árg. '89. 2 píkadekk á felgum nú 600 kr.
Tlf. 210560

4 FELGUR
til VW Transportara, árg. '89 til sølu fyri 300 kr. Bakpottútstoyt nú 200 kr.
Tlf. 210560

FORD ESCORT 16
til sølu fyri 2.000 kr. Sportfelgur og vel, gáttir framman.
Tlf. 210560

EYKALUTIR
til Toyota Haice, árg. '89. Gearkassi og felgur, bíliga til sølu. Ring
Tlf. 210560

VW PASSAT TDI 1.9
til sølu, árg. 9/1998, er svartur og hevur sóltak.
Tlf. 333666

OPEL VECTRA 2.0 TDI
árg. 98, 79.000 km, til sølu fyri 130.000 kr.
Tlf. 457697

TOYOTA CARINA
16 ár, uttan plátur, til sølu.
Tlf. 447676

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 86 til sølu fyri 14.000 kr. Hevur koyrt ca 100.000 km, Nýsýnaður.
Tlf. 220112

DEKK TIL SØLU
4 stk. Firehawk 185/60 R14 til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 252990/312146 eftir kl. 18

TOYOTA HIACE LH 61
árg. 1989, í góðum standi + annar bilur av sama slag, til eykalutir, bíliga til sølu.
Tlf. 421057 ella 264574

TIL SØLU
BMW 324 D, árg. '86 til sølu.
Tlf. 226772

TIL SØLU
Eykalutir til Opel Ascona – sleipikrókur, lyktir o.m.a. Bíliga til sølu.
Tlf. 252072

OPEL OMEGA 2.0
árg. 87, við motorbreki, til sølu. Bilurin ið er silvurgráur, hevur nr. plátur, varð sýnaður í juli 02.
Tlf. 333988

OPEL ASTRA 1.7 D
árg. 96, st.car, koyrt uml. 138.000 km. Prísuppskot 65.000 kr.
Ring 421059 ella 228419

OPEL ASCONA
Opel Ascona fra 1972, den er bordeaux rød, har lige fået nye bremser, nysynet 8/2002, kører perfekt, nyrenoveret for 9000 kr, den kan indregistreres som veteran bil, med kabler til for og bag højttalere. Pris-ide 15000 kr. Jeg bor ved Hirtshals så det er ikke noget problem at få den med færgen!
Tlf. 0045 22733206, Tanja Leer

BILUR TIL SØLU
Ein Nissan Sunny, árg. '89 til sølu fyri 7.000 kr. Sýnaður í november 2002. Nýliga sporaður í 2003. Koyrir væl. CD-spælari fylgir við. Áhugaði ringi
Tlf. 262959/258485

DEKK TIL SØLU
4 stk. góð vetrardekk 205/65 R15 og 4 stk. píkadekk 185/65 R15 bíliga til sølu.
Tlf. 210808

MAZDA 626 2.0 GTI
árg. 10/86, til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 210234

SAAB 90
Árg. '86 bíliga til sølu.
Tlf. 317714

FIAT BRAVA 1.6i
Myrkabláur, árg. 97 til sølu. Bilurin er í sera góðum standi og er økonomiskur. Er eisini at síggja á www.bil.fo
Tlf. 224581

CITROEN ZX TIL SØLU
Ein Citroen ZX 1,9 diesel, árg. 92, til sølu fyri kr. 15.000. Eyka sett av dekkum fylgir við.
Tlf. 423428

MAZDA 323
árg. 12/88, silvurgráur, nýsýnaður, sær gott ut. Eykalutir: summardekk á felgum, nýggjur kølari, lyktir o.a.
Tlf. 424202

Amboð

EIN DREYGIBONKUR
til træ til sølu, við stólum og øðrum tilhoyr.
Vinarliga ring 214283

Arbeiði

FLISER
Pensionist søger mindre indendørs fliserbejde.
Tlf. 228058

TILKOMIN KVINNA
søkir arbeiði s.s. forrætning – ella fyrifallandi arbeiði, alt hevur áhuga.
Tlf. 319242

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamalt innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaansing

BARNAGÓÐ GENTA/KONA YNSKIST
at ansa eftir Dánjal, sum er 1/2 ár frá 1. mars, meðan mamman er í skúla.
Tlf. 313437/255492

HALLÓ!
Er tað onkur omma ella genta, sum kann passa 10 mán. gomlu dóttur okkara ímeðan vit eru til arbeiðis.
Ring 320820 ella 223727

Barnaútgerð

SIMO KOYRISTÓLUR
til sølu við posa og regnslag. Prísur 2500,- Nýprísur 5.000,-
Tlf. 251303

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Bláur barnavognur av slagnum Silver Cross til sølu fyri 750 kr. Dýna, koddi, undirlag og regnslag fylgja við.
Tlf. 251303

TIL SØLU
Skrástólur 150 kr. Eisini nakað av babyleikutoyi.
Tlf. 316027-407

KOYRIPOSI TIL SØLU
Bláur føroyskur koyriposi til sølu fyri 400,- kr.
Tlf. 322850

RIMASONG YNSKIST
Rimasong, har botnur og síða kunnu flytast, ynskist.
Tlf. 321242

BARNAMØBLAR
Tvey sett av barnamøblum til sølu. Sovibriks við 2 reyðum skuffum, skrivararborð við 3 reyðum skuffum og skáp við 3 reyðum skuffum og 1 grønum skápi.
Tlf. 372539

BILSTÓLUR
2 bilstólar 0-19 kg. fyri 200 kr. stk.
Tlf. 448535

TIL SØLU
Grønur Silver Cross til sølu.
Tlf. 311140/511140

TIL SØLU
Rock-A-Tot Deluxe bilstólur 850,- kr. Nýprísur 1250,- kr. Beriseli Baby Dan 250,- kr. Bert 7 mør. gamalt.
Ring 320624

BRIO KOMBIVOGNUR
grønur/beigaður, brúktur til eitt barn, til sølu fyri 1900 kr. Puslitaska fylgir við.
Tlf. 333988

TIL SØLU
Bláur og hvítur barnavognur við tilhoyri til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 370035 - 257737

BARNAVOGNUR
Myrkabláur barnavognur v/ neti og regnslagi til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 370035 - 257737

TIL SØLU
Babylift, br. floyal v/ madrassu, brúkt til eitt barn, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 314640

Bátaútgerð

EGNINGARMASKINA
Sjafistad Autoline-skipan til sølu. Umfatar: Splittari/egnari og stokkar.
Tlf. 447389

EIN 8 HK SABB MOTORUR
atskildur við skrúvu, aksli, stevnurori og oljutanga til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 319144 ella 219144

TIL SØLU
Seksæringur til sølu.
Tlf. 373878

DREV TIL SØLU
Ett drev til sølu av slagnum Mariner merchruser 5/7 L-OMC. Nýrenoverað. Vinarliga ring á
tlf. 214283

VHF
av merkinum Skanti 3000, sum nýggjur, til sølu fyri 3.400 kr.
Tlf. 318675

SEKSÆRINGUR TIL SØLU
Báturin er í góðum standi, longd 32 føtur. Útgjørdur við m.a. línuspæli og snellum.
Tlf. 220415 ella 229522

MOTORUR TIL SØLU
Perkins, 6-cyl. 110 BHK v/ 2700 RPM. Hydraulik motorur, fast monteraður.
Tlf. 220415

ER TAÐ NAKAR,
ið hevur eitt frambygt seksmannafar úr glasfipur við fiskiloyvi at selja mær. 4 mannafar við skvatliborð kann møguliga ganga inn í keypið. Vinarliga ring
tlf. 266250 ella 443050

BÁTAGEAR TIL SØLU
PRM 160 VR2, nýrenoverað, bíliga til sølu.
Tlf. 220415

GLASTREVJABÁTUR VIÐ DEKKI TIL SØLU
26 fót Mýra, við 72 HK Solé Mercedes. Útgerð: Ekkolodd, sjálvstýrara, VHF-kompass, Radio/-cd, lensipumpu, spulipumpu/ vatnstandalarm, eldsløkkjara, 3-automatiskar oljutrýstsnellur. Báturin hevur fiskiloyvi 5D bátur undir 15 brt., og verður seldur til hægsta boð, við ella uttan fiskiloyvi.
tlf. 220422

FISKILOYVI TIL SØLU
Fiskiloyvi 5D til bátar undir 15 brt. verður selt til hægsta boð.
tlf. 220422

BÁTUR TIL SØLU
Ein Myra 27 fót bátur til sølu. Báturin er klárur til Norðhavsútróðurin. Umborð eru 4 nýggjar DNG snellur. Annars hevur báturin alla útgerð, um hon ikki er av nýggjasta dato. Prísuppskot: 330.000 kr. Hevur hetta tín áhuga, so ring
Tlf. 422063

Bingo

BINGO
Tvøroyar Klubbi hevur bingo leygarkvøldið 1. febr. kl. 20.
Nevndin

RIMMAR MATBINGO
Rimmar matbingo verður í B36-húsinum sunnudagin 2. febr. kl. 15.00. 15 plátur fyri 100 kr. Lutaseðlar verða drignir. Bingola og 20 kr. spæl. Koyring heim.
B36-gentur og -piltar 1991

BINGO
Gott bingo verður í VB-húsinum mikudagin 29.01.03.
Dreingjaliði hjá VB

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum tórskvøldið 30. januar kl. 19.00.
Tvøroyrar Bóltfelag

Bøkur

BØKUR TIL SØLU
Gísla søga Súrssonar 50,-.
Stjórnarskipanarmáli 1946, 75,-.
Menneskets biologi 50,-.
The Cloning Issue 40,-
Tlf. 317075

Burturm. /funnið

ADIDAS »LIGHT« SKÓGVAR
Tann, sum lænti mínar innandura Adidas skógvar í høllini 27/28 des. 02. verður biðin um at stilla teir aftur í ítróttarhøllina í Trongisvági. Takk fyri.
Tlf. 372252, S. Nielsen

DAMUUR
gulllitt og av merkinum Skagen Design – burturmist í Havn 20. januar.
Tlf. 321242

HARRAUR FUNNIÐ
Harraur funnið á bilbásunum á Skálatrød 17. januar.
Tlf. 317282

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 317997

HÚS TIL LEIGU
frá 1. februar. Húsini eru í tveimum hæddum, standa mitt í býnum. Køkur, stova, kontór, 3 kømur, bað/wc og hjallur. Prísuppskot: 6.000 kr. + el. og hita. Ring uml. 16.20.
Tlf. 213303

TRÚGVANDI KVINNA
Einlig trúgvandi kvinna søkir íbúð ella stórt verilsi, skal byrja at arbeiða í Tórshavn.
Bill.mrk. 1514

ELDRI HÚS YNSKJAST TIL LEIGU Á BYGD
Alt hevur áhuga. Eg fari væl um og gjaldi stundisliga.
Tlf. 268091

MØBLERAÐ ÍBÚÐ/HÚS
ynskist til leigu í Tórshavn ella nærhendis, til ein av okkara funktionerum.
Pihl Føroyar, Tlf. 317646

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki